

## Fitt didda sett fitt met

Í dag skrivar Vágaportalurin, at hann hevur fingið sendandi hesa fittu myndina av hesi fittu diddini sum hevur sett eitt so fitt met. Í gjár skuldu diddan og foreldrini koma í summarfrí í Føroyum, men floglíkindini vóru ikki av teimum bestu. So diddan reikaðu runt við foreldrunum, meðan bíðað hevur verið eftir líkindum, og innanfyri eitt samdøgur hevur hon verið í Danmark, Íslandi, Noregi og so Føroyum. Foreldur eru Myrna Simonsen og Regin Fjallsbak.

## Lisitatiónúrslit - fendarar á Krambatanga

Mánadagin hevur verið lisitatión á Landsverki. 7 tilboð eru komin inn um at veita og heingja upp fendarar á Krambatanga í Trongisvági. Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um niðurtøku av 5 fendarum og veiting og uppheinging av 5 nýggjum fendarum. Arbeiðið skal vera liðugt í seinasta lagið 1. des. 2009. Innkomnu tilboðini eru: SeaStar 676.500kr., J&K Petersen 757.763 kr., J&K Petersen 846.241kr., Mest 906.920 kr., Tangavirkið 928.000 kr., H.J. Grevstur 947.234,05 kr. og Articon 947.500 kr.

# Úr Skotlandi til Føroya í kajakk

**Tveir bretar, Patrick Winterton og Mick Berwick, eru í løtuni á veg úr Skotlandi til Føroyar í kajakk. Endamálið er at savna pening til bjargingarfelag**

RÓÐUR
*Rógvi Nybo*
*Rogvi@sosialurin.fo*

Bretarnir Patrick Winterton og Mick Berwick eru í løtuni á veg úr Skotlandi til Føroya í kajakk. Teir løgdu frá landi í Stornoway tann 27. Juni, og vænta at verða í Suðuroy í morgin. Endamálið við ferðini er at savna pening til bretska bjargingarfelagið RNLI.

Somu menninir gjørdu eisini eina roynd í fjør, men tá máttu teir gevast, áðrenn teir náddu fram. Nøkur hava roynt hetta bragdið, men enn hevur tað ikki eydnast nøkrum at rógva allan vegin úr Skotlandi til Føroya í kajakk.

Í dag boðaðu teir frá, at teir eru við at koma undir Føroyar, og at teir vænta at koma inn á Suðuroy í morgin.

Spurninguri, ið teir royna at svara við hesum langa róðri, er hvørt tað er gjørligt at taka tvær vanligar sjókajakkir og rógva tær gjøgnum teir 410 kilometrarnar av ófyrigevandi Atlantssjógvi til Føroya.

Sankta Brendan gjørdi tað í 6.øld í einum lítlum árabáti, og Tim Severin endurtók tað bragdið í 1976. Karen og Dan Trotter máttu í 1995 gevast, bert 80 kilometrar frá málinum, og í fjør noyddust Patrick Winterton og Mick Berwick eisini at gevast. Longdin á teininum, kuldin og møguleikin fyri ógvusligum sjógvi eru orsøkin til at so fá hava roynt. Men nú bendir alt á, at tað fer at eydnast teimum.

Bjargingarbáturin Royndin hjá Suðuroyar Norðara Bjargingarfelag fer at taka ímóti tá teir nærkast landi.





